# Skulu vera til reiðar til alt

**Politi, sløkkilið og sjúkrahús skulu vera til reiðar til øll sløg av vanlukkum, men tað eru tey ikki í dag. Løgtingið skal týsdagin hava aðalorðaskifti um, hvussu tilbúgvingin í Føroyum skal skipast**

TILBÚGVING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Tá stóra vanlukkan aftur hendur, skulu øll vita, hvat er rætt at gera fyri at hjálpa. Í Føroyum er tað í dag politiið, sum skipar fyri, hvussu farast skal fram tá stórar vanlukkur henda.

Men nógv onnur hava týðandi leiklut. Sjúkrahúsini, sløkkiliðini, bjargingarfeløgini, vaktar- og bjargingartænastan, bjargingartyrlan, froskmenn, sálarfrøðingar.

Alt hetta skal skipast í eina felags tilbúgvingarætlan fyri at hjálpin skal vera so góð sum yvirhøvur gjørligt. Løgtingið skal týsdagin hava aðalorðaskifti um, hvussu ein tilbúgvingarætlan skal leggjast til rættis.

## Á sjógvi og landi

Ein tilbúgvingarætlan skal fevna um allar tonkiligar vanlukkur bæði á landi og sjógvi.

Á landi er tað politiið, sum samskipar, men kommunurnar hava í dag ábyrgdina av vanlukkum, sum henda í teirra øki.

– Nógvar kommunur eru alt ov litlar til at hava ábyrgdina av stórum vanlukkum. Har mugu broytingar gerast. Antin skulu kommunurnar gerast størri ella skal ábyrgdin flytast til landsmyndugleikar, sigur Rógvi F. Johansen, sum er samskipari í tí verkætlanin, ið hevur gjørt tilbúgvingarætlanina.

Sjóbjargingarstøðin hevur ábyrgdina av bjargingararbeiði á sjónum, men við eini møguligari oljuvinnu er eitt nýtt øki komið uppí. Hvussu gera vit í Føroyum, um ein stór oljudálking hendir á føroyskum øki.

Frágreiðingin um tilbúgvingarætlanina hevur verið á veg í fleiri ár, men er nú komin og politikararnir skulu viðgera hana. Í frágreiðingini eru gjørd tilmæli um, hvussu ein samlað tilbúgving kann gerast. Hvussu kann samskiftið tryggjast í eini vandastøðu ella, hvussu verður gjørt í Føroyum, um ein nýtt Tjernobyl-óhapp hendir.

– Okkara ynski er, at politikararnir vísa álit á okkara arbeiðið. At teir stóla upp á allar teir myndugleikar, sum skulu samskipa eina tilbúgving, so kunnu vit arbeiða víðari, sigur Rógvi F. Johansen.

Hann vísir á, at yvirtøkur er ein stórur partur av arbeiðinum við tilbúgvingini. Samskipanin av tilbúgvingini í Føroyum liggur undir Fiskimálaráðnum, men ábyrgdin fyri fleiri økjum liggur enn í Danmark. Í løtuni verður seinasta hond løgd á yvirtøkuna av kjarnorku-tilbúgvingini.

– Vit eru eitt so lítið land, at vit kunnu ikki hava ætlanir fyri alt, men vit mugu gera eitt skilagott samarbeiði við Danmark og onnur lond. Bæði um hjálp í serligum vandastøðum og um útbúgving, sigur Rógvi F. Johansen.



*Ein tilbúgvingarætlan skal royna at geva svar upp á, hvussu besta og skjótasta hjálp verður samskipað, tá stórar vanlukkur henda*
*Savnsmynd*

## Yvirmenn mynstra uttan sáttmála

**Fleiri av vaktarskipunum í frálandavinnuni sum eru undir fremmandum flaggi, men hava føroyskan reiðara, lata yvirmenn mynstra uttan sáttmála**

SÁTTMÁLAR FREMMANDIR

Eini 15-20 føroyiskir yvirmenn hava mynstrað við vaktarskipunum í frálandavinnuni, uttan nakran sáttmála.

Ellintur M. Abrahamsen, formaður í Skipara- og navigatørfelagnum, vísir á, at felagið ikki kann hjálpa teimum monnum, sum ikki mynstra eftir einum sáttmála ella mynstra við skipi undir fremmandum flaggi.

Hann metir, at eini seks-átta vaktarskip hava føroyskan reiðara, men skipini eru skrásett undir fremmandum flaggi. Í fleiri førum sigla menn við teimum skipunum uttan tær trygdir, sum eru í vanligum sáttmálum.

– Tveir menn stóðu frammanfyri mær, tí teir høvdu fingið sekkin av einum av hasum bátunum, men teir høvdu ikki rætt til eina krónu í uppsagnarhýru, tí teir høvdu mynstrað eftir eini avtalu um fast krónutal fyri hvønn dag, sigur Ellintur M. Abrahamsen.

Skipara- og navigatørfelagið ávarðar yvirmenn um at mynstra uttan at tryggja sær sáttmálavunnin rættindi.




## Eingin evropisk rentuhækking hesa vikuna

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var í stóran mun merkt av búskaparligum uppgerðum úr USA og Evropa. Sum væntað, gjørdust so at siga allar uppgerðirnar bjartar og bjartari enn væntað. Millum annað vísti dagføringin av búskaparvøkstrinum í USA í 3. ársfjórðingi, at hesin nú hækkaði 8,2% mótvegis mánaðar gomlu metingini á 7,2%. Eisini gongdin á arbeiðsmarknaðinum gjørdist betur enn tá seinast varð uppgjørt. Einans 355.000 fólk søktu um arbeiðsloysisstuðul av fyrsta sinni í farnu viku, og hetta er lægsta talið síðani januar 2001. Prógvini um at framgongdin í amerikanska búskapinum veruliga er staðfest, økjast sostatt.

Thanksgiving var í USA í farnu viku, og førdi við sær, at lutfalsliga lítið virksemi var á altjóða marknaðunum. Hetta var eina av orsøkunum til, at marknaðirnir ávirkaðust avmarkað av sera góðu uppgerðunum, ið kunngjørdar vóru. Tískil er væntandi, at marknaðirnir fara at taka góðu tíðindini til sín hesa vikuna, og hetta kann sannlíkt føra við sær hækkandi rentur og partabrøv.

Hinvegin gongst illa hjá dollaranum fyri tíðina og hesin er alsamt viknaður mótvegis evruni og krónuni. Beint fyri evstamark kostaði dollarin 6,20 krónur, og hetta er lægsta stig síðani 1999. Orsøkin er gjaldsjavnahallið í USA, og framgongdin í USA kann økja trýstið á gjaldsjavnan, soleiðis at dollarin kann vikna meira. Hesi viðurskifti kunnu syrgja fyri, at rentustigið um okkara leiðir ikki hækkar samsvarandi búskapargongdini, tí ein viknandi dollari og harvið ein styrknandi evra (og króna), er tálmandi fyri evropiska búskapin.

Vestas Wind Systems A/S gav fríggjadagin 28. novembur eina kunning um 3. ársfjórðing. Kunningin gjørdist eitt satt vónbrot. Í samband við kunningina lækkaði Vestas sølumetingarnar fyri 2004 av tí at bíleggingarnar úr USA og Týskalandi væntandi eru skotnar út. Bæði í ár og næsta ár metur Vestas, at sølan fer at lækka um kr 750 milliónir í ávíkavist kr 12,6 milliardir og kr 14 milliardir. Samstundis metur Vestas, at rakstraravkastið fellur úr 7% í 5%. Eftir kunningina fall kursurin á Vestas ikki minni enn 20%.

Millum áhugaverdastu búskaparligu uppgerðirnar hesa vikuna er vinnuálitið og arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA. Hesar verða væntandi góðar og kunnu fáa lánsbrævarentur og partabrøv at hækka hesa vikuna. Hósdagin hevur evropiski miðbankin mánaðarliga rentufundin. Marknaðarrák metur ikki at leiðandi rentustigið í Evropa verður broytt á hesum fundinum.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% → |
| 2 ára lánsbræv | 3,09% | 0,14% ↑ |
| 5 ára lánsbræv | 3,91% | 0,13% ↑ |
| 10 ára lánsbræv | 4,65% | 0,08% ↑ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 245,5 | -0,6% ↓ |
| OMX, Svøríki | 616,8 | 0,5% ↑ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.591,7 | 0,4% ↑ |
| S&P 500, USA | 1.058,2 | 0,6% ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,52 | -0,2% ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 163,26 | -0,4% ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 71,70 | -0,8% ↓ |
| Altjóða Partabrøv | 72,03 | 1,2% ↑ |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 619,77 | -1,9% ↓ |
| EUR | 743,94 | 0,0% → |
| GBP | 1.068,29 | -0,4% ↓ |
| NOK | 91,08 | -0,1% ↓ |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*





*TABULIGT. Hygg eg ræðist hana slett ikki. Hon er slett ikki sjúk, sigur Jónfinn Olsen frá Miðflokkinum, sum hættaði sær at taka um Sonju J. Jógvansdóttir*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Einki samband millum samkomur og samkynd

**Bíblian stýrdi kjakinum fyri og ímóti teimum samkyndu í Læraraskúlanum leygardagin. Tey kjaksinnaðu vóru so ymisk, at eingin livandi vón var fyri nakrari semju. Tað hevði ongin væntað. Ein løgtingslimur fekk sinnini í kók, tá ið hann vendi kanónunum**

TABU-RÁÐSTEVNA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Klapp, klapp. Buh og hurrá.

Fólk livdu væl við á taburáðstevnuni í Læraraskúlanum leygardagin. Politisku ungmannafeløgini høvdu sett allan dagin av til kjak um evni, sum antin eru forboðin, illa dámd ella goymd burtur í Føroyum. Kjakast var frá morgunstundini um rúsdrekka, porno, abort og homosexualitet.

Sosialurin legði leiðina framvið frá umleið klokkan 16 og úteftir, tá samkynd og teirra støða í samfelagnum var á skránni. Við hvør sín enda á tíggju metrar langa pallborðinum sótu Sonja J. Jógvansdóttir og Peter O. K. Olofson. Eitt ólíka par. Sótu tey langt frá hvørjum øðrum at byrja við, so komu tey ikki nærri tann góða hálvan annan tíman kjakið gekk so lystiliga.

Frammanundan hevði samkynda Sonja J. Jógvansdóttir úr nýstovnaða Ælaboganum mælt til, at kjakið ikki bleiv stýrt av Bíbliuni. Hon fekk ikki sítt ynskið uppfylt.

## Samkynd og pedofil

Peter O. K. Olofson, prestur, legði fyri. Hann gjørdist ikki heimsins populerasti maður, tá ið hann samanbar rættindini hjá samkyndum við tey hjá pedofilum.

– Um eg vil hava fýra konur, og um eg vil hava sex við børnum. Hví skal tann lóggevandi myndugleikin forbjóða mær tað. Hvat verður tað grundað á? Hví verður loyvi so givið til homosexualitet? Tað er rein tilvild. Einki er rætt ella satt, bara tí vit føla tað. Nøkur virði og nakrir normar eru yvir tað einstaka samfelagið. Annars hava vit anarki, segði Peter O. K. Olofson.

Í aðrari helvtini av salinum varð dúgliga nikkað. Hin helvtin av salinum vendi eyguni av berari andstygd fyri tí, sum presturin førdi fram. Men hann steðgaði ikki kortini. Hann vísti aftur, at ein mannarættur er nóg góð próvførsla fyri, at vit skulu loyva samkyndum og verja teirra rættindi.

– Mannarættindi byggja á konsensus, men tey eru ymisk til ymiskar tíðir. Tann náttúrliga lógin byggir millum annað á tey tíggju boðini. Frá skapanini eru maður og kvinna skapt til hvønn annan. Hesum skulu vit rætta okkum og okkara samfelag eftir. Vit eru her fyri at føra ættina víðari. Tað er okkara identitetur. Góðtaka vit homosexualitet, so ganga vit ímóti náttúruni. Ganga vit ímóti náttúruni, so kann pedofili gerast tað næsta, segði Peter O. K. Olofson.

## Skapt til kvinnur

Bæði buh og klapp, tá ið Olofson var liðugur.

Sonja J. Jógvansdóttir, sum var tann næsta at taka orðið, valdi í fyrstu syftu at lata provokatiónina hjá prestinum liggja. Hon vísti á, at hon hevði tørv á at elska kvinnuna, tí kvinnan varð skapt til hennara.

– Tað er ein mannarættur at fáa góðkent sína sexuellu orientering, men vit eru ikki til í Føroyum. Tí mugu vit hava samkynd við í anti-diskriminatións-paragraffina, og vit mugu fáa loyvi at fara í skrásett parlag. Øll hini Norðurlondini hava hetta í teirra lóggávu, men vit liggja sum ein skammblettur mitt í Norðuratlantshavinum. Tað undrar meg, tí tað er bara ein lítil lóg, ein evarska lítil paragraff, sum ikki ger seg inn á nakran. Hví skal hon koppa einari heilari samgongu? spurdi Sonja J. Jógvansdóttir.

Lógvabrestir, sum vitnaðu um, at tey samkyndu og teirra stuðlar vóru fleiri í salinum.

## Næstrakærleiki í fokus

Tað leikaði hart á eina løtu. Karin Kjølbro, fyrrverandi løgtingskona og leiðari fyri kriminalforsorgini, talaði at teirri einvísu tulkingini av Bíbliuni, sum Olofson og hansara fólk løgdu fyri dagin.

– Kuldi og frástøða er tað ringasta í einum samfelagi. Næstrakærleikin er grundleggjandi í einum kristnum samfelagi. Tað var ein, sum tordi at sita til borðs við teimum, sum vóru útihýst. Vit eiga at góðkenna samkynd. Vit eiga at stuðla hesum djørvu fólkum, sum standa fram sum samkynd. Hvat fólk gera í songini er ein privat søk, so leingi tey ikki gera seg inn á onnur. Tey hava bara ein annan máta at elska uppá, segði Karin Kjølbro, sum vísti aftur, at tey samkyndu hava staðið fyri nøkrum ræðuleikum.

Peter O. K. Olofson vendi sær frá næstrakærleikanum, sum Karin Kjølbro umboðaði.

– Tað er ikki næstrakærleiki at góðtaka menniskju, sum ganga ímóti náttúruni, segði hann og vendi aftur til at samanbera við pedofili.

## At taka sær rætt

Øði spann í ein politiskan eftirkomara hjá Karini. Annlis Bjarkhamar, fráfarin landsstýriskvinna fyri Tjóðveldisflokkinum, reisti seg og talaði harðliga at Olofson.

– Olofson hevur rætt at velja, hvat hann skal trúgva. Tann rættin brúkar hann til at taka rættindi frá øðrum samfelagsbólkum. Rættindi krevja, at tú livur upp til nakrar skyldur, men hvønn rætt hevur hesin prestur at taka rættin frá samkyndum? spurdi Annlis Bjarkhamar hørm.

At síggja til, vóru bara tjóðveldispolitikarar til staðar. Í øllum førum var bara ein løgtingslimur, ið tók orðið. Tað var Rói Egholm úr Tjóðveldisflokkinum. Politiska eftirspælið kann gerast áhugavert, tí koma tey samkyndu fyri løgtingið, hóttir Miðflokkurin við at spreingja samgonguna.

## Atkvøður ja!

Rói Egholm gjørdi púra greitt, at hava tey samkyndu tørv á hansara stuðli, so trýstir hann á ja-knøttin uppá tann eina dagin. Hann segði seg annars vera kristnan, og hann talaði at tí ógvusligu framferð, sum summi, ið tóku sær rættin at tulka bíbliuna, løgdu fyri dagin. Og so fekk hann øði í grindina. Hann vísti til nakað av tí, sum útvarpsstøðin Lindin, sendir seint á kvøldið. Og tað helt hann ikki verða borðbært.

– Har sita vaksin fólk seint um kvøldarnar, við greiðum seksuellum undirtónum og siga seg vera forelskað í Jesus. Tey eru upphissað fyri opnari mikrofon. Tað er blasfemi! Tað ljóðar sum rein orgasma, og tað hevur einki við kristindóm at gera. Tað skuldi verið forboðið, segði Rói Egholm.

Róp kom í salin. Sosialurin takkaði fyri seg. Tað var kortini vónleyst at fáa samkomurnar og tey samkyndu við samhugaðum at tosa sama mál.